Ì Dimmu 12-12-08

# Tá Tjaldrið sleipaði Sólborg heim úr Labrador.

**Týsmorgunin 24. juli 1979 kom eldur í rækjutrolaran Sólborg, ið var til fiskiskap við Labrador.**

## Eldur umborð á Sólborg.

Umborð á Sólborg var vaktarskifti sum vanligt á midnátt tann 23.juli 1979. Tá varnaðust menn eld og royk í neðra har frammi í skipinum. Í somu løtu kom ein dekkari rennandi upp á brúnna at boða frá, at eldur var í. Roykurin bleiv so nógvur og tjúkkur, at ikki var farandi niður gjøgnum leytaran aftur. Boð vóru nú givin um at fáa alt fólkið út á dekkið, og boðað var frá til skipini, ið lógu nærhendis. Somuleiðis var neyðarkall sent út. Nú var farið undir at kanna eldin og at koma fram at við sløkkiútgerð, men tað vísti seg, at eldurin hevði breitt seg sera skjótt, og ein kolasvartur roykur - saman við tí nógva hitanum – gjørdi, at teir eftir fleiri royndir vóru noyddir at gevast at fáa tamarhald á eldinum. Øll manningin var nú savnað úti á dekkinum í øllum góðum.
Roykurin og hitin var nú vorðin so nógvur, at skiparin gav manningini boð um at fara í bjargingarbátarnar. Nú vóru bara skiparin og stýrimaðurin eftir umborð á Sólborg. Tá tað leið móti morgni fór stýrimaðurin av skipinum og nakað seinni skiparin. Teir vóru upptiknir av V. U. Hammersheim. Eisini nakrir av manningini á Sólborg vóru fyrr um náttina farnir umborð á Hammershaimb. Hinir av manningini vóru tiknir umborð á M/T Hvítanes. Eldurin hevði nú breitt seg aftur í skipið og upp á brúnna.
Fleri royndir vóru gjørdar av Hammersheim at seta fast á Sólborg og eftir nøkrum døgum eydnaðist tað umsíðir. Hammersheim byrjaði nú at sleipa Sólborg eystur-yvir við kós móti Føroyum.

## Tjaldrið fer úr Føroyum til hjálpar.

Umborð á Tjaldrinum vóru teir í ferð við at taka trolið hjá TN 200 Heyganes inn, tá teir um morgunin 25. juli fingu boð um at koma á Havnina eftir útgerð, tí Tjaldrið skuldi fara Sólborg til hjálpar. Tá trolið var komið innanborða, varð farið á Kollafjørð at leggja tað upp. Náttina fyri hevði Tjaldrið verið á Klaksvík við Heyganes, har kavarar vóru niðri og skóru av skrúvuni. Tá trolreiðskapurin hjá Heyganes var lagdur upp í Kollafirði, var farið á Havnina at bunkra og taka proviant og aðra útgerð. Sólborg hevði eina manning, ið taldi 25 mans. Roknast kundi við, at nakrir av manningini komu heim aftur við Tjaldrinum, og so var.
Klokkan átta mikukvøldið tann 25. juli fór Tjaldrið av Havnini og vestur gjøgnum Skopunarfjørð. Kós varð nú sett mest sum í beinan vestan móti Sólborg. Teinurin, ið skuldi siglast, var 1520 fjórðingar. Veðrið var av tí besta, 1 til 3 vindstig av landnyrðingi líka til leygardagin, tá hann øtlaði. Vindurin kom upp í vindstyrki 6 til

7 av vestri og útnyrðingi. Vindurin lá mest sum beint ímóti og inn á bakborðs bógv. Klokkan 11.30 leygarmorgunin fekk Tjaldrið ein sjógv. Ein sleipitrossi, ið lá surraður í einum pavni á afturdekkinum, reiv seg leysan og var um at fara fyri borð. Tikið var nú frá, so menn kundu surra trossan fastan aftur. Tað vísti seg, at nøkur skottir av pavninum vóru farnar fyri borð, men út á náttina til sunnudagin batnaði veðrið, og  tað var fínasta veður, líka til Tjaldrið var aftur í Føroyum við Sólborg upp á sleip.

**Tjaldrið kemur til Sólborg.**

Fríggjamorgunin klokkan fimm fekk Tjaldrið samband við V. U. Hammershaimb á 2281m Hz, (tá var ikki sattelittur sum nú) sum lá hjá Sólborg. Skipini vóru tá stødd 130 sjómil eystur úr Labradorstrondini, og tað visti alt væl við, hóast  roykur enn sást koma úr Sólborg. Skiparin á Sólborg Ingolf Rasmunsen var saman við 7 av manningini á Sólborg umborð á Hammersheim. Hinir av manningini vóru farnir inn til Labrador við Hvítanes. Eisini var maskinmeistarin á Sólborg, Ebert Olsen, umborð á Hammersheim. Sunnukvøldið klokkan átta var Tjaldrið frammi hjá skipunum. Tað vóru gingnir 96 tímar, síðan Tjaldrið fór av Havnini. Hammersheim hevði sleipað Sólborg spakuliga eysturyvir, og vóru teir nú komnir 390 sjómíl eystur úr Labrador. Hetta gjørdi, at teinurin var styttri (uml.1270 sjómíl) at sigla hjá Tjaldrinum enn mett. Miðalferðin hjá Tjaldrinum var 13,3 sjómíl um tíman.

**Farið verður undir at sløkkja eldin umborð á Sólborg.**

Nú var lagt stilt, og báturin settur út. Farið varð at borði hjá Hammersheim og vórðu allir 8 menninir av Sólborg tiknir umborð á Tjaldrið. Veðrið var av tí besta. Í logbókini hjá Tjaldrinum stendur, at tað var stilli. Ikki hava vatnkanónirnar á Tjaldrinum verið nógv í drift (sjálvandi venjing) hesi 32 árini, skipið hevur verið í sigling, men í hesum føri komu tær væl við. So skjótt fólkið av Sólborg var komið umborð á Tjaldrið, var lagt tætt upp á síðuna á Sólborg. Hetta kundi lata seg gera, tí veðrið var so gott. Kanónirnar vóru mannaðar, og var nú Sólborg sprænd undir við sjógvi. Hetta køldi skipið av, og var hetta neyðugt at gera, áðrenn roykkavarar kundu fara umborð. Tjaldrið var liggjandi tætt at Sólborg í tveir tímar og sprændi við brandkanónunum niður yvir dekkið og skipssíðuna.
Klokkan tíggju um kvøldið fór eitt roykkavaralið undir leiðslu av maskinmeistaranum á Tjaldrinum, Sofusi Johansen, umborð á Sólborg. Nú kom tað væl við, at skiparin og maskinmeistarin á Sólborg, Ingolf og Ebert, vóru til taks, og fóru teir saman við tí fyrsta kavaraliðnum umborð á Sólborg. Teir kendu jú skipið og kundu greiða frá, hvussu skipið var innrættað. Av tí sama var tað nógv lættari hjá roykkavarunum at finna fram í skipinum, sum var fylt við royki. Eisini var ein annar vandi á ferð. Sólborg var frystiskip burturav, og til at dríva frystiútgerðina varð ein veska nýtt, sum kallast freon, og tá freon kemur í samband við eld útviklast eitt vandamikið gassslag, so roykkavararnir máttu vera ógvuliga varnir.

Tá komið var á dekkið, vísti tað seg, at tað var so heitt, at botnarnir undir stivlunum hjá roykkavarunum vóru um at smelta. Tað skal sigast, at hetta vóru vanligir gummistivlar (í dag brúkar man trygdarstivlar). Farið varð nú undir at sløkkja. Fyrst var skúm fylt í lastina, og síðani var vatntoka sproytað í maskinrúmið. Tá hetta var gjørt, fóru roykkavararnir niður í maskinrúmið í eini roynd at basa eldinum. Samstundis var Sólborg lensa við pumpum, sum sløkkiliðið hevði við sær av Tjaldrinum. Boð vórðu eisini givin til Tjaldrið um at starta brandkanónirnar aftur, og lá Tjaldrið alla tíðina og sprændi út yvir Sólborg uttanborðs og omandeks. Hetta vísti seg at muna væl, tí tað køldi dekkið á Sólborg heilt væl.
Mánamorgunin klokkan 08.00 kundi sløkkiliðið boða frá, at eldurin var sløktur, og nú varð farið undir at lensa fyri at rætta slagsíðuna upp. Menninir av Sólborg vóru við í sløkkiarbeiðinum.

**Farið verður undir heimferðina.**

Farið varð nú undir at rigga til at sleipa, og klokkan tíggju varð kósin sett móti Føroyum. Sólborg hevði tá eina slagsíðu upp á 10 stig. Veðrið var av tí allar besta. Í logbókini er skrivað, at tað er tvey vindstig og skýggjað. Klokkan tíggju um kvøldið varð farið umborð aftur á Sólborg fyri at kanna, hvussu til stóð umborð. Samstundis varð lensað. Hetta var gjørt 2 ferðir um samdøgrið á allari heimferðini, og ongin trupulleiki var at koma umborð. Veðrið var av tí allarbesta allan túrin.
Sunnudagin 5. august stevndi Tjaldrið við Sólborg upp á sleip suður gjøgnum Djúpini og inn á Fuglafjørð. Klokkan fimm um dagin lá Sólborg trygt við kei, eftir at Tjaldrið hevði sleipað í 151 tímar. Miðalferðin var 9 sjómíl um tíman. Eftir at rækjurnar vóru lagdar upp í Fuglafirði, varð Sólborg sleipað til Havnar, har hon var løgd.
Mánadagin 15. oktober setti Tjaldrið aftur fast á Sólborg. Hesuferð skal hon til Norra, har hon skal gerast aftur. Sama kvøldið fara bæði skipini av Havnini, og koma tey til Hadsund um morgunin 17. august.

Heimildir:
Skiparin á Sólborg
Ingolf Rasmunsen
Skipsdagbókin av Tjaldrinum